


www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 03 - 2013

# Stórt oljufelag hóttir við at gevast í Norðsjónum

Tað stóra týska oljufelagið Bayerngas fer at gevast við sínum virksemi í tí danska partinum av Norðsjónum, um ætlanin hjá donsku stjórnini at krevja meiri skatt frá feløgunum verður framd í verki. Bayerngas er tann største einstaki íleggjarin í tí danska partinum av Norðsjónum uttan fyri Dansk Undergrunds Consortium. Sambært Børsen ætlar felagið ikki at bjóða upp á rættindi í donskum øki frameftir. -Danmark er ikki so áhugavert longur. Tí hava vit steðgað øllum fyrireikingunum til at bjóða í næsta útbjóðingarumfari, tí vit duga ikki at síggja nakra meining við tí longur, sigur forstjórin í teirri donsku deildini av Bayerngas, Arne Westeng, við blaðið. Hann leggur afturat, at felagið hevði ætlað sær at bjóða í tí næsta útbjóðingarumfarinum, og at fyrireikingarnar vóru byrjaðar. -Men nú tann danska stjórnin ger, sum hon ger, kann eg ikki mæla okkara nevnd til at koyra meiri pengar inn á tann danska marknaðin, sigur danski Bayerngas-forstjórin. Tað týska felagið hevur gjørt íløgur fyri tvær milliardir krónur í Danmark. Morten Mønster, oljuserfrøðingur hjá ráðgevarafyritøkuni Deloitte, skilir væl, at Bayerngas tekur seg aftur úr Danmark. Hann sigur, at oljufeløgini halda seg til lond, sum hava støðug politisk viðurskifti, og sjálvur heldur hann, at Danmark fer at missa nógv virksemi í Norðsjónum við at herða skattareglurnar.